HEILSANIR

Elskaði Robert
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum tann 14. nov. ynskja
mamma og babba

Sig tað er lygn!!! Henda steikin verður 40 í dag. Vónandi orkar tú nakrar túrar afturat saman við okkum. Gleða okkum super nógv til leygarkvøldið.
Heilsan, Ternurnar

Góði Heri
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum.
Heilsan, omma, abbi og Hans Jacob gubbi

Góða Birita
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum. Alt tað besta ynskja
mamma & babba

Hey, fitti!
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum ynskja
omma, abbi og bamba

Góða mamma, sviger og omma
Tillukku við teimum 70 árunum. Vit gleða okkum til leygardagin.
Kærar heilsanir, Majbritt, Anton og børnini

Góða gumma
Hjartaliga tillukku á 40 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
Kærar heilsanir, Jákup og Jónfinn

Góða Arngerð!
Hjartaliga tillukku á 40 ára degnum. Vit gleða okkum til ballið.
Heilsan frá mostir og Hans Jacob

Góða, fitta Signhild
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
Bestu heilsanir, omma og abbi úti á Oyri

Góða, elskaða Eydna
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 14. nov. Jesus pápi vælsigni framtíð tína.
Muss & klemm frá mammu, babba og lítla Hjørti

Hey mamma
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
Bestu heilsanir frá okkum, Jónrid

Eydna Jónsveinsdóttir
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 14. nov. ynskja
omma og abbi í Havn

Góða elskaða Signhild
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini ynskja
Mamma, babba og beiggi

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

FÓLKATINGSVALIÐ 2001

Ríkisfelagsskapurin, lykilin hjá okkum til útheimin

Edva Jacobsen,
valevni Sambandsfloksins

Tá ið ríkisfelagsskapurin er lykilin, so er útheimurin tann hurð, sum vit skulu lata upp fyri at nýta teir møguleikar sum eru hinumegin.

Eg skal bert nevna 2 ting sum gera tað sera týdningarmikið hjá okkum í Føroyum at kunna lata hesa hurð upp, og tey eru:

1. Útbúgvingarmøguleikar í Danmark:

Tað er næstan ikki tað heim í Føroyum sum ikki hevur notið gott av hesum útbúgvingarløguleika. Vit taka tað bara fyri givið at tey ungu fara niður at lesa, tað verður bara spurt um hvat ein fer at lesa og hvussu nógv ár tað tekur. Vit koma inn á skúlarnar á jøvnum føti við tey sum búgva í Danmark. Hetta er ein møguleiki sum ríkisfelagsskapurin gevur okkum.

Hendan møguleika vilja flokkar nú fyri ein og hvønn prís sleppa okkum av við. Hetta kemur at ganga út yvir okkara egnu børn.

2. Rætt til sjúkraviðgerð í Danmark:

Hvussu nógv hava ikki notið gott av at vit kunnu koma á ríkissjúkrahúsið og fáa ta hjálp sum har er at heinta. Hjálp sum vit í Føroyum ikki hava møguleika at veita sjálvi. Hendan ágóða hava vit, og vit taka tað bara fyri givið at tað er soleiðis. Hetta er eisini ein møguleiki sum ríkisfelagsskapurin gevur okkum.

Við at loysa frá Danmark og slíta tað samband sum liggur í ríkisfelagsskapinum lata vit nógvar hurðar aftur, og hetta vil gera ein óbøtaligan skaða fyri Føroyar og tað fólkið sum her býr.

Fyri Javnaðarflokkin er sjálvsavgerðarrætturin ómissandi

Hans Pauli Strøm,
løgtingsmaður
fólkatingsvalevni fyri Javnaðarflokkin

Tað er ein stór misskiljing, tá Tjóðveldisflokkurin ger spurningin um sjálvsavgerðarrættin hjá føroysku tjóðini til ein spurning, um danskir politikarar vilja viðurkenna hann.

Fyri Tjóðveldisflokkin er politiski viljin í Danmark avgerandi

Eitt dømi um hetta merkiliga undirlutakompleksið er blaðgrein hjá Kristinu Háfoss týsdagin, har sagt verður, at »tað hevur avgerandi týdning at sjálvsavgerðarrættur føroyinga verður viðurkendur av dønum«!!! Og at danska »stjórnin sigur at danska fólkatingið skal viðurkenna eitt úrslit av eini føroyskari fólkaatkvøðu. Hervið er sjálvsavgerðarrættur føroyinga fokin – tí uttan mun til hvørja støðu stjórnin tekur, hevur hon seinasta og avgerandi orðið«! (mín undirstriking –hps) Hava tit hoyrt makan ? Bert danska stjórnin sigur okkum ímóti, so »er sjálvsavgerðarrættur føroyinga fokin«!!!

Tí hava føroyingar ómissandi sjálvsavgerðarrætt

Sjálvsavgerðarrættur er ein felags rættur hjá einum fólki ella landi, til at gera av sína egnu støðu. Føroya fólk hevur sjálvsavgerðarrætt, tí at eftir okkara egnu sjálvsfatan er tað so, at

- føroyingar eru serstøk tjóð, eitt serstakt fólk, við egnari mentan og máli, og
- Føroyar eru eitt serstakt land, við egnum lógum og politiskum stovnum.

Sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi. Hann kunnu vit brúka til at fremja okkara felags áhugamál. Men mótvegis tí sum tjóðveldisfólk og teirra halahang trútta og júka, so kunnu vit aldrin missa hann við at velja eina ávísa stjórnarstøðu – sjálvsavgerðarrætturin kann ikki missast uttan so at landið ella fólkið, her býr, forfarast onkursvegna.

Fyri Javnaðarflokkin er politiski viljin í Føroyum altavgerandi

Tað avgerandi er, hvussu vit í Føroyum kunnu semjast um at útinna okkara sjálvsavgerðarrætt. Vit kunnu taka loysing, ella vit kunnu velja at skipa Føroyar sum eitt sjálvstýrandi land í ríkisfelagsskapi:

- um føroysku politisku myndugleikarnir taka avgerðina á kvalifiseraðan hátt,
- um føroyska fólkið áhaldandi tekur undir við avgerðini, m.a. á fólkaatkvøðu.

Um danskir myndugleikar siga, at teir krevja ávísar mannagongdir fyri at viðurkenna eina avgerð, sum føroyingar taka, so er hetta ikki ein trupulleiki hjá okkum, men hjá dønum sjálvum. Tí er óneyðugt hjá tjóðveldisfólki at gera teirra trupulleikar til okkara, bert til rumbulsmakarí í valstríðnum.

Treytirnar fyri føroyskum sjálvsavgerðarrætti seta føroyingar sjálvir. Týdningarmest er at føroyingar í stórum meiriluta taka undir við teirri avgerð, sum skal fremjast. Samgonguflokkarnir hava prógvað í 4 ár, at tað klára teir ikki. Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum stendur nú eftir sum savningloysnin í sjálvstýrismálinum, íð røkkur tvørtur um miðjuna og kann sameina størsta meirilutan aftan fyri seg. Betur enn nakar av hinum flokkunum evnar Javnaðarflokkurin at skapa tað neyðuga samstarvið, millum føroyingar innanhýsis, og við danskar myndugleikar, stjórn og fólkating.

Hesum stuðla vit við at velja Javnaðarflokkin.

Vinnan og møguleikar hennara í ríkisfelagskapinum

Johan Dahl,
fólkatingsvalevni sambandsfloksins

Sambands flokkurin stendur sum ein liberalistiskur flokkur, ið altíð vil geva vinnuni góðar karmar at arbeiða undir, tí vinnan saman við arbeiðandi fjøldini er hjarta í samfelagnum.

Ein breið vinnað við kreativum ígongdsetarun og undangongumonnum/og kvinnum innan Fiskivinnu,KT,Gransking, o.a. er ein ynski-støða fyri eitthvørt framkomið samfelag.

Sambandsflokkurin arbeiðir fyri at geva hesum tey allarbestu kor og forteytir at arbeiða undir .

Sum ein partur av Ríkisfelagskapinum og standandi við ábyrdgini frá 1994-98 var Sambandsflokkurin við til at gjøgnumføra tað sum danir nevna Erhvervefremmelógir í Føroyum.

Hesar lógir vóru ætlaðar geva føroyskum virkjum og kreativum einkultpersónum møguleikar at fáa eksperthjálp/Ráðgeving og stuðul, trygdir frá garantifonden og harafturat figging, á jøvnum føti við restina av rikinum.

Millum møguleikarnar sum eru kann nevnast:

- Ígongsetarahjálp til at stovnan av egnum virki har staturin betalir 50% av lønarkostnaðinum fyri t.d. ein verkfrøðing í ár eins og ókeypis ráðgeving verður givin í ávíst tíðarskeið.

- Sonevndar Ísbrótara ordningar,har td. eitt virkið sum metir seg nýta ov nógva orku ella kanska dálkar umhvørvi við síni orkukeldu, - fær ókeypis ráðgeving og loysnir – staturin betalir hesa rágeving 100% og gevur stuðul upp til 50% av nýíløguni til orkuforbedringar sum harvið eisini forbedra okkara umhvørvi.
- Sum partur av Ríkinum,- um tú hevur eitt lítið virkið, kanst tú fáa trygd frá garantifonden uppá upp til 50% av íløguni. Hendan garanti kann tú so nýta í samband við fíggingina av virkinum

Ein sera góð ordning fyri einhvønn ígongdsetara av nýggjum virkjum.

Hesum fekk eftirkomandi Samgonga forpurrað, tí tær eftirkomandi » erhvervsfremme ordningarnar« sum skuldu setast í gildi eisini í føroyum blivi ikki gjøgnumførdar, tí hildi var at vit nokk skuldu passað og klára okkum sjálvi her á klettunum.

Nógvar av hesum lógum og reglum eru ikki galdandi í Føroyum í dag, tí politiski viljin her á landið er ikki til tess, - men við einum Virknum Sambandsflokki á fólkatingi vilja vit gera alt sum stendur í okkara makt. at føroyska vinnan skal fáa atgongd til m.a. hesar møguleikar, sum eru okkara rættur sum partur av ríkisfelagskapinum.

Arðir møguleikar inn fiskivinnuna eru t.d.

Fiskaríbankin, sum gevur fígging til nýggj initiativir í fiskivinnuna har smávinna (útróðrabátar kunnu fáa fíggja t.d. Kr. 100-150.000 har einans 50% skulu afturgjaldast uppá vanlig lánikor, restin er stuðul .

Danmarks Skibskreditfond veitir sera lagaliga fígging til farma og fisikiskip.

Hendan fígging verður vanliga einans veitt til felløg/virki innan ríkisfelagskapin.

Vit hava atgond til TIC centur í Danmark har eitt hav av møguleikum og vitan til allar partar av vinnuni liggur og bíður eftir at bliva gagnnýtt.

Í Føroyum er TK-stovan ein partur av hesi eind sum verður fíggja av erhvervsfremmestyrelsen og vinnumálastýrinum.

Eisini sum 3. land og ein partur av ríkinum hava vit saman við t.d. partnarum úr 2 ørðum ES – Londum atgongd til fíggingar og stuðulsmøguleikar inn ES , til at gera nýíløgur í t.d. Føroyum - hetta gjøgnum tað sonevnda 5. rammuprogramm .

Her er bert nevndur ein lítil partur av teimum verkamøguleikum, stuðuls- og fíggingarmøguleikum sum eru innan ein virknan ríkisfelagsskap.

SAMBANDSFLOKKURIN VIRKAR FYRI AT HAVA EITT VIRKI og FJØLBROYTT VINNULÌV , - Stuðlið okkum til at umboða tykkara sak á fólkatingið.

Velji sambandsflokkin tann 20.novembur

Gott Val.